**Albert:**

# Sigling undir 1. heimsbardaga

**Albert, sum var pápi Johan, kom at sigla til Íslands undir 1. heimsbaradaga. Hetta kundi eisini vera spennandi**

I 1914 var tað Óli Mortensen skuldi hava Pilot at føra. Djurholm og Hans P. Weihe áttu Pilot saman. Óli og Djurholm vóru svágrar. Tá ið vit fóru yvir á Eysturlandið, kom Djurholm sjálvur við. Mær dámdi sera væl Djurholm.

Í august byrjar 1. heimsbardagi. Tá lógu vit undir Íslandi. Hetta frættist skjótt, hóast eingin telefon var. Skipini prajaðu jú hvørt annað. Skipini komu inn undir Langanes, og her var lætt at geva boð millum skipini. Nógv skip fóru eisini heim beinanvegin, men ikki vit. Vit fóru heim tá ið túrurin var liðugur.

Í 1915 vilja íslendingar keypa bátar úr Føroyum. Teir keyptu ein, sum æt Albatros. Dánjal í Norðskála hevði átt hann. Hann hevur verið eini 15-20 tons. Eg haldi, at Elias í Rættará hevði bygt hann. Hann var keyptur upp til Ísafjørðin, og eg skuldi fara upp hagar við honum. Niels í Heiðunum var skipari. Við vóru eisini Kristian í Gásadali og Símun Askham. Tá vit komu í Faksabuktina kom ein so ring høgætt. Vit løgdu okkum uppundir jøkulin har. Ankraðu upp og lógu nakrar dagar. Komu so inn á Ísafjørðin, sum var eitt deiligt pláss. Hetta er ein ordilig nátúrhavn. Vit fingu so fría reisu heim aftur og 200 kr. fyri túrin.

So hevði Elias í Rættará smíðað ein nýggjan bát til Norðfjørðin. Hetta var ein 10 tonsari. Niels skuldi føra hann yvir. Nú vóru vit bert tríggir við. Tað var nokk so ringt veður, tá vit komu inn um Norðfjarðahornið. Tað var so ringt, at ein bátur bleiv burtur hendan dagin. Okkurt skip kom eisini inn, sum hevði fingið brotið okkurt á dekkinum.

Íslendingar yvirtóku so bátin, og teir komu so við okkum til Seyðisfjørðin. Vit komu heim aftur við ferðamannaskipinum Botnia hjá DFDS.

## Makkur kom í lastina

Vit sigldu eisini Lítlu Doru yvir til Íslands. Hana hevði ein islendskur handilsmaður keypt frá Müller. Hetta var ein langbummari. Tað merkir, at hann bert hevði eina mastur. Hann kundi taka eini 30 tons. Vit fóru fyrst norður til hvalastøðina við Áir. Her fyltu vit hana við hvalasveivum, sum teir brúktu til okkurt í Íslandi. Tær blivu nokk niðurgrivnar og súrgaðar.

Hon hevði ein gamlan Dan motor og gekk spakuliga. Vit fóru so frá Áir ein seinnapart. Tað bleiv so nógvur vindur av útsynningi og tjúkt, tá vit komu norður fyri Mjóvanes. So helt Niels, at vit skuldu fara inn á Klaksvík og leggja okkum fyri náttina. Vit fara so avstað dagin eftir.

Tá vit koma yvir móti Seyðisfjørðinum, nú er eitt enskt orlogsskip har. Tað var nógvur vindur og eisini regntjúkt. Hann gav okkum boð um at steðga. Hetta var á kvøldi, og teir skuldu koma umborð morgunin eftir. Tað bleiv so tjúkt um náttina, at vit sóu ikki hvønn annan. Tá helt Niels, at tað var best at stinga av. Vit settu segl til og fulla ferð á motorin, so avstað og sloppið var. Vit komu beint inn á Dalatanga.



Her verður fílað



Soleiðis lógu sluppirnar undir Íslandi

Á vegnum yvir bleiv íslendingurin svakur í høvdinum. Hann vildi leypa fyri borð og forgera sær. Vit máttu binda hann. Hann varð so koyrdur til lækna á Seydisfjørðinum, og tað gingu fleiri dagar, til hann var í ordan aftur.

Lastin fór so upp á Sauðarkróki longri norðuri. Tá var makkur komin í. So tað var eitt rættiligt tørn at fáa reinsað lastina aftur. Vit fara so víðari fram við Kappan. Tá síggja vit so nógvan rekavið. Hetta er undir krígnum, og tað var mangul uppá brenni. Íslendarin orðnar so fyri, at vit skulu taka rekaviðin inn. Vit fylti lastina við timbri og fóru so á Ísafjørðin. Hann seldi allan viðin og gjørdi kvettið.

Hann hevði eina lítla afturlast. Har hevði hann keypt sukur og kaffi, sum var tollskyldugt í Íslandi. Hann passaði tað so, at vit skuldu koma inn um náttina og liggja uttanfyri. Bátur kom umborð, eg haldi at hetta hevur verið avtalað spæl. Hann fekk alt í land tollfrítt. Morgunin eftir fóru vit inn gjøgnum rennuna á Ísafjørðinum. Tá vit vóru komnir seldi hann skipið beinanvegin, og tann nýggi eigarin bjóðaði okkum at sigla fyri seg við salti til bygdirnar og at taka fisk aftur við.

Tummas fór heim, men eg og Niels vóru eftir, og vit sigldu seinnapartin av sumrinum til langt út á heystið fyri Jónsson. Vit sigldu millum bygdirnar í økinum. Ein íslendingur kom umborð sum motorpasari. Tað vat massar av fólki sum arbeiddi við at turka fiska á Oyruni har. Vit komu heim aftur við tí bátinum hjá DFDS, sum kallast Island. Hann gekk so skjótt. Vit fóru av Reykjavík og skuldu á Seyðisfjørðin, og haðani til Føroyar. Um kvøldið fóru vit av Seyðisfjørðinum til Føroyar. Vit spældu kort út á náttina, og vit vóru ikki meira enn vaknaðir morgunin eftir, tá vóru vit inni móti landi í Føroyum. So skjótt var tað. Skiparin æt Lydersen. Tað var hann sum seinni sigldi hana uppá land.

Árið eftir fór eg aftur til Íslands við einum báti sum æt Merkur. Hetta var ein bátur sum hevði siglt við ferðafólki, posti og frakt millum Tvøroyri, Vág og Havnina.

Vit høvdu eina sildanót við, og tá vit komu nakað yvir blivu vit aftur stoppaðir av einum enskum orlogsskipi. Teir komu so umborð. Tað var gott veður. Teir hugdu í lastina og sóu bara nótina. Vit sluppu so. Annars plagdu teir at taka skip niður við til Hetlands. Vit koma so til Íslands og skulu fara á sildaveiðu við henni. Vit høvdu tveir snerpubátar. Sildin stóð inni í Ísafjarðsdýpinum, so tað var stutt at sigla. Vit fingu nakað av sild har. Sildin flutti seg skjótt norður eftir, og tá kom lítið burtur úr. Men vit vóru har fyri summarið. Bassurin búði á Ísafjørðinum, og hann varð kallaður fyri Jens Færeying.



Niels í Heiðunum var ein kendur sjómaður. Hann var saman við Albert, tá ið teir sigldu bátar til Íslands undir 1. veraldarbardaga

**Næstu ferð**
Í komandi parti verður greitt meira frá Jens Færeying, sum hevur eina serliga søgu

Sosialurin